# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kórseting yvir **Hjørdis Mellemgaard, Høje Taastrup, ættað úr Miðvági**, verður týsdagin kl. 11.00 í Vejlegård Kirke, Ishøjboulevard 1, Ishøj. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Elsba Hardlei, Tórshavn**, fer til gravar úr Havnar Kirkju mikudagin kl. 13.00.

**Erika Jacobsen úr Haraldssundi** andaðist á Norðoya Røktarheimi sunnudagin 7. februar, 85 ára gomul.

**Jessy Ryggstein, Skopun**, fødd Vestergaard Christiansen, ættað úr Hørg, Sumba, andaðist á Áargarði 8. februar, 81 ára gomul.

†

Sagt verður frá, at okkara elskaða kona, mamma, omma, langomma og vermamma

**Elsba Hardlei**
Tórshavn

andaðist fríggjadagin 5. februar, 70 ára gomul.

Jarðarferðin verður mikudagin 10. februar kl. 13.00 úr Havnar Kirkju.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jan**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða dóttir, systir og svigarinna

**Anja í Lambanum**
Fuglafirði

brádliga andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum øll, sum vóru um okkum í sorgini, tøkk til tykkum, sum komu inn á gólvið, ringdu og sendu heilsan.
Tøkk til Ælabogan sum spældi í kapellinum, tøkk til Siloakórið og Teir 8, sum við sangi gjørdu jarðarferðina serliga hátíðarliga.
Tøkk til samkomuna í Siloa og til Fuglafjarðar kirkju fyri hjartaliga umsorgan og praktiska hjálp til jarðarferðina og ervið.
Tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt vóru har, tøkk til tykkum sum bakaðu til ervið og hjálptu til á annan hátt.
Tøkk til øll, sum vildu minnast Anju við at lata pening til tónleikabólkin Ælabogan.
Og at enda, tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Malena, Steinbjørn, Sandy og Jana**

# 25 ára starvsdagar

Fríggjadagin 29. januar kundu trý av starvsfólkunum hjá Solar Føroyum hátíðarhalda sín 25 ára starvsdag í fyritøkuni.
Tey eru Finn Jørgensen, sum er stjóri í dag, Anna Petersen, skrivstovukvinna, og Sven Stensborg fíggjarleiðari.
Solar Føroyar varð stovnað í januar 1985. Tá helt fyritøkan til í bygninginum hjá Thomas Dam á Hálsi. Í dag heldur Solar Føroyar, sum hevur 12 fólk í starvi, til í egnum virkisbygningi við Vegin Langa í Hoyvík.



*Finn Jørgensen, Anna Petersen og Sven Stensborg hava arbeitt hjá Solar Føroyum í 25 ár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 30 ára starvsdagur

Mánadagin 1. februar vóru 30 ár liðin síðan Per Skov Christensen gjørdist politistanæmingur í 1980. Per Skov Christensen er føddur 9. august 1953 í Viborg í Danmark.
Eftir lokna útbúgving gjørdist hann politistur í Keypmannahavn, til hann 1. oktober 1986 varð settur sum polistur í Havn. Síðan 1. mars 1991 hevur hann arbeitt á kriminaldeildini.



## Merkisdagar

**50 ára føðingardagur**
18. feb. verður Símun Poulsen, Bøgøta 15, Klaksvík, 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. feb í Skálanum frá kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Tey í vilja gleða Símun við at koma í føðingardag, kunnu siga frá á tlf. 221265 ella 220109 innan 14. feb.

**75 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 12. feb. verður Arni Johannesen, Tórshavn, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 13. feb. millum kl. 11-16 hjá soninum í Faksagøta 5 á Norðasta Horni.

**90 ára føðingardagur**
Leygardagin 13. feb. fyllir Eivind Gudmundsen, Sandavágur, 90 ár. Dagurin verður hildin í SÍF-húsinum frá kl. 16 til 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 4. feb. hava Oda og Árni Frederiksberg, á Strondum, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fíggjakvøldið 19. feb. frá kl. 18 í Kelduni í Skálafirði.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 12. feb. hava Hanna og Eirik Justinussen, Leirvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Dalavegi 40, Tórshavn, millum kl. 14 og 18.